VIÐMERKINGAR

Loysing og fullveldi hoyrir einari farnari tíð til

Edmund Joensen

Tann stóri hópur av hugsandi føroyingum dugir at síggja, at loysing og fullveldi loysir ongar trupuleikar, men skapar harafurímóti alskins nýggjar trupuleikar, og kollrennur alt tað føroyska samfelagið. Henda svart - hvíta hugsanin hoyrir eini farnari tíð til. Engin nýmótans føroyingur hevur áhuga í at hoyra farnari tíð til.

Ofta hoyra vit fólk siga naka soleiðis: "Eg eri ikki loysingarfólk", ella "eg eri sambandsfólk". Størsti parturin av føroyingum hoyra til hendan bólkin, og tað siga eisini veljarkanningarnar.

Hesi fólkini hava eisini tað til felags, at tey ynskja at viðurskiftini í ríkisfelagskapinum skulu vera vælvirkandi og nýmótans. Akkurát hvussu og hvat eru ivaleyst ymsar meiningar um.

Hesi fólkini er helst samd um, at hetta skal gerast á ein fyri føroyingar virðiligan hátt, sum framvegis ger okkum føroyingar stoltar sum tjóð og byggir brúgv ímillum partarnar í ríkisfelagskapinum.

Henda stóra fjøld av fólki vil sjálvandi ikki av við ríkisborgararættin. Hesi fólkini vilja í heila tiki ikki av við vælferðartrygdina. Rættindini í samlaða ríkinum skulu varveitast í heilum líki, onki minni enn tað. Sjálvandi! Tí her hava føroyingar alt at vinna.

Stóri trupulleikin fyri hesa stóru fjøld av Føroya fólki er, at 5 av 6 politiskum flokkum hava sum fremsta mál at gera av við henda sama ríkisfelagskap, trygd, rættindi og vælferð. Summir beinan vegin, aðrir skjótast gjørligt. Tann sjeyndi og nýstavnaði ætlar at flenna at øllum.

Tað er bara ein tryggur vegur at ganga. Tað er at velja Sambandsflokkin. Tann flokk sum vil tað, sum stóri fólkaviljin vil, nevnliga at nýmótansgera viðurskiftini í ríkisfelagskapinum, og skapa trygg figgjarviðurskiftir í vælferðarsamfelagnum Føroyum.

Nýggja tíðin

Samstarv og samvinna ímillum lond, er loysunarorðið og vegurin fram í hesum globaliseringstíðum. Hetta samstarv og hesa samvinnu eiga allir føroyingar eitt gylt atgongumerki til ígjøgnum ríkisborgararættin.

Allir hugsandi føroyingar vita, at tað eru óteljandi fyrimunir í ríkisfelagsskapinum.

Fyrimunir sum eru altavgerandi fyri menningina av øllum tí føroyska samfelagnum.

Sambandsfólk ella ikki loysingarfólk eru eyvitað ikki heilt samd í øllum viðurskifum (t.d. vinstra og høgra politikki). Tað er natúrligt. Men tey eru samd um, at vit skulu saman menna vælferðarsamfelagið. Tað sum skilir er helst meira, hvussu hetta verður gjørt og hvussu samfelagsgóðin annars skal bítast.

Júmen táið tað eru so nógvir føroyingar, sum eru samdir so langt, hví skulu teir so ikki samla seg um tann flokkin, sum er felagsnevnarin fyri hesum øllum somlum.

Hví so velja flokkar sum hava annað í kvittanum, og sum hava fyri neyðini at tosa uttanum. Hví væntа at flokkar, sum vóru klárir at loysa eftir næstseinasta- og seinasta val, fara at gera annað hesuferð? Hví velja flokkar sum hava víst, at teir vóru klárir og vildu ofra rættindi, trygd og valferðarsamfelagið?

Sambandsflokkin veitst tú hvar tú hevur. Hann er einasta alternativið til loysingina, og hann má gerast so stórur hesufer, við ábyrgd fyri tykkum, at tað verður hann sum setur dagskránna.

Tí tað er hann sum stendur sum felagsnevnari fyri tí stóra hópinum av føroyingum bæði fyri sambandfólki og eisini fyri ikki loysingarfólki, táið samanum kemur.

Tað góða samfelagið er eisini Tað grøna samfelagið

- tí skulu vit eisini stuðla uppundir lokalt náttúru- og umhvørvisarbeiði, t.d. so sum tær grønu eldsálirnar í Vestmanna slóða fyri

Hans Pauli Strøm,
Valevni fyri Javnaðarflokkin í Norðstreymi

Tað týdningarmesta við einum góðum umhvørvispolitikki er, at hann verður eitt felags mál fyri okkum øll, ikki bara myndugleikar, politikarar og serfrøðingar - men at hann eisini verður ein náttúrligur táttur í okkara vinnulívi og ein livandi ábyrgd hjá hvørjum einstøkum borgara.

Tí vit fremja tann góða umhvørvispolitikkin í tí mátanum, vit liva uppá. - í tí smáa í gerandisdegi okkara einsvæl og í teim stóru verkætlanunum. Tí hetta snýr seg um mátan vit fara um okkara náttúru, mátan vit brúka okkara tilfeingi, mátan vit húsast uppá í okkara vinnulívi, í okkara fyrisiting, í okkara privata húsarhaldi.

Tí má umhvørvispolitikkurin bæði verða landsfevnandi eins og lokalur - ein sak fyri politikkaran einsvæl og fyri tann einstaka borgaran.

– Bæði land og kommunur mugu gera umhvørvisætlanir, so eisini Føroyar kunnu liva upp til tey krøv, sum altjóða samfelagið hevur sett sær fyri at fremja í 21. øld - Agenda 21 kallað.

– Vit mugu hava eftirlit við ávirkanina á náttúru og umhvørvi av øllum almennum eins og privatum fyritakssemi og vinnu annars á sjógvi og landi.

– Vit mugu leggja okkum eftir at skilja rusk, at fremja endurnýtslu, kompostera ella gera mold úr lívrunnum burturkasti og styðja ætlaninar um biogass-annlegg.

– Vit mugu eisini styðja uppundir onnur lokal tiltøk at fremja umhvørvisgóðan hugburð og umhvørvisundirvísing, t.d. við sonevndum grønum skúlum og barnastovnum.

Vit standa ikki á berum á fleiri av hesum síðstnevndu økjunum. Vit eru so heppin, at tað eru fólk, sum av sínum eintingum og við eldhuga slóða fyri við nógvum góðum lokalum ætlanum. Hugsi her m.a. um tær grønu eldsálirnar í Vestmanna, sum bæði við egnum tiltøkum og í góðum samstarvi við kommununa ganga undan í lokala umhvørvisarbeiðinum - men sum sakna betri almennar karmar og at tað almenna sýnir virksemi teirra størri áhuga og styðjar betri upp undir tað. M.a. við at fáa hesa lokalu Agenda-21 skrivstovuna upp at standa, sum skal veita ráð og kunning til borgararnar.

Styðjar tú Javnaðarflokkin á valinum, styðjar tú hesar ætlaninar um ein virknan umhvørvispolitikk í Føroyum.

Suðuroy og framtíðin

Finnleif Guttesen
Valevni í Suðuroy

Tali av ungum millum 0-19 ár minkar við umleið 200 fólkum og tali av eldri yvir 65 ár økist við umleið 300 fólkum tey komandi 25 árini.

Hetta sigur mær, at nú skal ikki tosast og kannast meira, nei, nú skal ein komandi samgonga og landsstýrismenn við dirvi, taka avgerð og leggja almenn arbeiðspláss í Suðuroy, fyri at venda tí dørpu framrokningini av fólkatalinum í oynni.

Hesi arbeiðspláss kunnu verða Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Strandfaraskip Landsins, Hagstova Føroya og onnur.

At flyta eitt ella tvey arbeiðspláss ger alt ov lítlan mun, tað skal verða millum hálvtrýss og hundrað arbeiðspláss, sum skulu verða flutt innan eitt ella tvey ár.

20% av andstøðuni á tingi flutt Suðuroyar

Hergeir Nielsen

Upp undir jól er vanligt at suðringar koma heimaftur at vitja, og eru vit øll sera fegin um, at so er.

Nakrir teirra vitjandi eru harafturat so fegnir um at koma hendanvegin, at teir hesi jólini eisini taka flyting á pappírinum.

Felags starv teirra er, at teir allir sita á tingi, og eru partar av andstøðuni.

Vit, sum hava stríðst við at flyta almenn arbeiðspláss hendanvegin, standa steinrunnin uppi yvir hesum íkasti, sum soleiðis heilt av sær sjálvum leitar hendanvegin.

Vit halda tað vera eina stórhending, og maðurin á gøtuni er so smátt farin at rokna við, at teir kanska flyta alt tingið hendanvegin.

Vit suðringar bjóða teimum hjartaliga vælkomnum, ynskja teimum gleðilig jól, og rokna sjálvandi við, at teir eru komnir fyri at vera.

Framá við Sjálvstýrisflokkinum

Kenneth Rasmussen
form. Unga Sjálvstýri

Sjálvstýrisflokkurin er fyri yvirtøku av øllum málsøkjum so hvørt, sum vit hava ráð og fyrisitingarligan førleika til tess. Men vit vilja tryggja okkum, at allir føroyingar hava tað gott og trívast á vegnum móti fullari ábyrgd í øllum málum. Tá eitt málsøkið er yvirtikið vendst ikki aftur, tí mugu øll viðurskifti, sum viðvíkja økinum verða lýst væl og virðiliga, áðrenn vit taka ábyrgdina. Ikki fyrr enn vit eru óheft av donskum pengum, kann støða takast til, um vit vilja loysa ella ikki. Tá tað er hent, kunnu føroyingar fara til fólkaatkvøðu. Eingin vil taka eina so stóra avgerð, um útlitini fyri komandi tíðir eru ótrygg.

Allir møguleikar opnir

Sjálvstýrisflokkurin vil halda fram á sjálvstýrisleið, men ásannar eisini, at í løtuni eru nógv mál, sum eru meiri átroðkandi enn yvirtøkur. Fíggjarligu útlitini eru ikki góð og partar av vinnuni eru í djúpari kreppu. Hesa sannroynd fara vit at taka við í komandi samráðingum um at skipa landsstýri. Vit hava ongar bindingar um at fara í samstarv við ávísum flokkum og fara í ta samgongu, har vit fáa flest av okkara sjónarmiðum við.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Minningarorð um Linu Arge

Sunnumorgunin 14. desember komu boðini um, at Lina Arge var slóknað 85 ára gomul. Nú var hennara lívsskeið at enda komið og virknar hendur faldaðar á seinasta sinni. Hon var troytt nú og trongdi til hvíldina.

Tað verður løgið aftur at ganga fram við hugnaligu húsum hennara mitt í Havnini og ikki at síggja hana sita við vindeygað. Har sat hon vanliga við stokkum ella øðrum handarbeiði fyri at fáa sum mest av dagsljósi, tí eyguni bilaðu tey seinnu árini. Hon dugdi sera væl til hendurnar og nógv kom burturúr, sum hon plagdi at geva burtur. Hon var blíð at koma inn til og í hugnaligu stovuni hevur mangur sitið væl. Hon plagdi t.d. at bjóða 'góðaráð' og alt bakaði hon sjálv.

Vit kendu einans Linu hennara ellisár, men hava fingið manga søguna um hennara virkna lív, um Málingahandilin, sum byrjaði í hennara kjallara, og har hon arbeiddi, og um tey 27 árini, hon var 'kaffikona' á Sjómansskúlanum og hvønn morgun rann niðan trappurnar har - hetta var góð venjing. Hon var altíð so glað, tá hon hitti onkran, sum mintist hana av sjómansskúlanum, og eina av seinastu ferðunum hon var í Klaksvík, segði hon smílandi frá, hvussu stýrimenninir umborð á Dúgvuni høvdu tikið undir armin á henni og hjálpt henni, tí hetta var jú 'kaffikonan'!

Lina var familjukær og átti nógvar vinir bæði her og uttanlands, og hon var trúføst at halda samband við vinir sínar. Tað var ofta, tú hoyrdi málið á henni í telefonini - stundum var tað okkurt, hon hevði hoyrt í útvarpi, ið upptók hana, tí hon sat væl undir øllum, um enn hon viðhvørt sá lítla meining við dagsins samfelag.

Lina hevði ferðast víða, og tað besta hon visti var at sleppa burtur at ferðast, síggja onnur lond og fáa sól. Í mong ár var hon umboð fyri Føroyar í felagsskapinum Samnordisk Pensionärskultur og ferðaðist til skeið har og fann sær nógvar vinir millum norðurlendskar pensionistar. Henni dámdi væl at vera millum fólk og hevði mong áhugamál. Hon var á sinni við í Kvinnufelagnum, var

ógvuliga virkin í Pensionistafelagnum í Havn, nevndarlimur í Hjartafelagnum í mong ár og tók eisini lut í arbeiðinum Bót til bata hjá Føroya felag móti krabbameini.

Hennara lív var ikki altíð ein dansur á rósum, men hon var lívsglað og hvørja ferð sjúka rakti, stríddi hon seg við sínum sterka vilja á føtur aftur. Men eisini hon mátti sanna tað, sum sálmaskaldið so beinrakið tekur til:

"Tey sjeyti ár er vár jarðarleið
í stoltasta stríð og møði;
um áttati-aldur ein kappi beið,
alt sárkaðist ellisstøðið."

Og sárt var at síggja, hvussu ørkymlandi tað var fyri hesa sjálvbjargnu kvinnu at missa sín førleika. Hon vildi fyri alt í verðini klára seg sjálva. Fyri nøkrum árum síðan var hon fyri døtti og breyt seg sundur. Hon stríddist av øllum alvi fyri at koma aftur fyri seg, men tá hon so dánt fekk gingið, hendi tað syrgiliga, at hon aftur datt og breyt beinið. Enn einaferð stríddist hon fyri at verða frísk, og hevði ilt við skilja, at árini fingu hana aftur. Hon legði seg undir skurð við vón um bata, men vónbrotið var stórt, tá hon ikki kendi sær nakað framstig, og so kom seinasta sjúkan uppí, sum hon ikki fekk vunnið á. Seinasta mikudag var hon borin út úr Vesturkirkjuni.

Við hesum orðum vilja vit lýsa frið yvir minnið um Lina Arge.

Takk fyri trúfestið og hvíl í friði!

Tóra og Nicolina

Minningarorð um Denhard Kurt Joensen

Leygardagin 15. septembur í ár andaðist Kurt Joensen, Fuglafirði, 65 ára gamal.

Hóast tað ikki kom heilt óvart, so var tað tungt at fáa deyðsboðini av Kurt Joensen. Kurt var ættaður úr Kollafirði, sonur Jógvan og Elsebeth Malenu Joensen úr Húsinum.

Kurt kom til Fuglafjarðar í 1966, tá hann giftist við Annefiu Johannesen. Tey fingu 6 børn, fýra synir og tvær døtur.

Fyrstu ferð eg mynstraði sum stýrimaður, var við "Kappanum" í desembur 1971. Tá kom eg umborð sum 2. stýrimaður fyri Kurt, sum hevði fingið sær nakrar frítúrar. Túrarnar aftaná kom eg at sigla saman við Kurt. Fyrstu túrarnar var hann fyrri stýrimaður, og so onkran túr seinni var hann skipari. Tá Kurt var skipari, var eg 1. stýrimaður hjá honum. Tann avloysingartíðin var so liðug, og okkara vegir sum skipsfelagar skiltust tá.

Í 1975 fekk eg hýru sum einastýrimaður við "Dagsstjørnuni", sum tá var vaktar- og bjargingarskip. Í februar mánaði áríð eftir kom at mangla ein stýrimaður. Spurt var tá, um eg visti ein stýrimann. Víst varð á Kurt, sum eg helt vera ein framúr skilamann. Hóast mínir førleikar at meta um tað vóru avmarkaðir, so bleiv tað mín sannføring til síðsta dag, at tann metingin var rætt. Har var onkur annar, sum eisini kendi Kurt, og tað var eingin ivi um at ringja og spyrja, um hann hevði hug at koma við. Kurt tók av, og hann sigldi við vaktar- og bjargingarskipunum til tann síðsta dagin, hann var arbeiðsførur. Vit komu umborð at loysa av síðsta fríggjadag í august í fjør.

Kurt hevði nokk ikki følt seg heilt væl túrin frammanundan, men tí gjørdi hann ikki stóran háva burturúr. Eg visti í hvørfall einki um tað. Kurt hevði verið á Landssjúkrahúsinum til eina kanning, meðan hann var heima. Júst tá Kurt var komin umborð við manningarskifti, fekk hann boð um at seta seg í samband við Landssjúkrahúsið. Hann ringdi út á Landssjúkrahúsið og fekk boð at koma til eina kanning aftrat, helst sama dag.

Seinni sama seinnapart ringdi sonur hansara og segði okkum, at pápi hansara var sjúkrameldaður, tí læknarnir høvdu staðfest, at hann hevði krabbamein í hálsinum og skuldi niður til viðgerð. Tað var ein hvøkkur fyri okkum allar, men vit livdu í vónini um, at Kurt fór at koma aftur friskur, men so var ikki.

Hesi árini, Kurt sigldi við vaktarskipunum, eru hendar nógvar broytingar, bæði hvat fiskimarki og fiskivinnulóggávu viðvíkur, eins og á tí tøkniliga økinum. Kurt var ikki ein, ið skúgvaði nýggjar avbjóðingar frá sær, men nærlagin setti hann seg inn í tað, hann hevði við at gera. Kurt var við Ólavi Halga, tá hann varð brúktur sum skúlaskip hjá sjómansskúlanæmingum. Mær tókti, at tað var eini ótrúlig evnir, hann hevði, at læra frá sær, og tað gjørdi hann so sera grundiga, at har datt onki lið burturímillum.

Fyrsta sum teldurnar komu umborð á skipini, royndu vit, sum tá sigldu saman, sum frægast í felag at seta okkum inn í tey ymisku viðurskiftini. Tað var fleiri ferðir, eg segði Kurt frá um okkurt, sum eg ikki fann útav. Ofta var svarið, at hatta fekk hann ikki hjálpt mær við, men so dagin eftir ella stutt seinni kom hann ofta og segði: "Tú, eg havi hugt at hasum, tú spurdi um, og eg havi funnið útav, at tað er soleiðis:…" Soleiðis var Kurt. Um hann ikki hevði eitt svar her og nú, so kendi hann seg ikki leysan av tí, hann var spurdur um, men royndi at finna, og fann ofta svarið.

Vit sigldu saman fyrst frá februar 76 til september 78, tá vit fóru á hvør sítt hold, og síðan bert vóru onkrar túrar saman, til vit fyrst í 90 árunum komu aftur at sigla fast saman.

Tað vóru nógvar hugnaligar løtur saman umborð. Ikki vóru vit altið samdir um tað, sum tosað varð um, minni enn so, og ofta varð eitt sindur harðmælt, men ongantíð fórdi tað til illstøðu. Tað átti nokk bara at vera so. Helst høvdu báðir meir ella minni hug at andøva ímóti.

Sum skipari á einum vaktar- og bjargingarskipi havi eg ofta hildið tað vera rætt at tosa við aðrar um, hvussu mundi vera rættast at gera. Oftast hevur tað verið við stýrimenninar, ein hevur tosað við um tey ymisku viðurskiftini. Uttan at taka nakað frá nøkrum øðrum, so loyvi eg mær at siga, at Kurt var mangan góður í ráðum, uttan at ein fekk kenslu av, at hann helt, at hansara meining var tann einasta rætta.

Kurt var við til bjargingar á sjónum, áðrenn hann byrjaði í Vaktar- og Bjargingartænastuni. Tann 2. januar 1957 sigldi Godanes á Flesjarnar og gjørdist vrak. Støðan var tann, at ein av brøðrunum hjá Kurt hevði verið við Godanesi og skuldi við túrin eftir. Tí vistu teir at Godanes skuldi koma tað kvøldið. Um kvøldið sóu teir, at tað var so upplýst við Flesjarnar.

Teir fóru tí at lurta eftir Tórshavnar Radio, fyri at vita hvat mundi vera hent. Teir hoyrdu tá, at Godanes hevði siglt á flesjarnar. Kurt saman við pápanum og brøðrum sínum drógu tá áttamannafar, maskinbátin teir áttu, og fóru út fyri at hjálpa, um tað var brúk fyri teimum. Teir komu bert til at taka eina boyu upp. Tað segðist at skiparin hevði bundi seg í eina boyu, tí tað manglaði eitt bjargingarbelti, men einki hekk í boyuni teir tóku.

Einaferð í 60árunum, tá klaksvíkingar vóru á veg til Føroya við einum sandbáti, sum teir høvdu keypt, forlistu teir. Teir sendu út neyðarkall, og skip fóru at leita. Millum teirra var Boðanes, sum Kurt var stýrimaður á. Teir lógu tá undir Shetlandi og krokaðu. Navigatiónsútgerðin var ikki tann sama tá sum nú. Teir høvdu bert ein peilara at halda seg til, og bjargingarbáturin hevði í mesta lagi ein sendara, men bert vóru tí útgerðini og við at krosspeila við onnur skip funnu teir gummibátin. Teir løgdu framat gummibátinum og tóku so fyrst menninar úr gummibátinum og síðan gummibátin. Menninir vóru allir vátir, men høvdu tað annars gott. Teir fingu turr klæðir frá manningini á Boðanesi, og so var ikki meira um tað enn, at Boðanes fór á Klaksvík við monnunum.

Einaferð vit vóru á Klaksvík við einum av vaktarskipunum, kom Bethuel Johannesen, Klaksvík, sum var skipari á sandbátinum, umborð á vaktarskipið. Hvørji ørindir hansara vóru, minnist eg ikki. Kanska bara at práta. Bethuel, sum ikki kendi Kurt aftur, spurdi Kurt, hvør hann var. Skemtingar samur sum Kurt var, svaraði hann: "Vit hava verið saman til skips, og tá var tú í buksunum hjá mær." Tá tað var sagt, tá visti Bethuel, hvør maðurin var, og teir fingu eitt gott prát saman.

Kurt, eins og kona hansara, Annefia, átti trúgvandi foreldur, og tann førningur, hann fekk frá ungum av, var honum ein stuðul alt lívið, og eftir tí aldu tey upp sini børn. Átrúnaðarliga var hann eisini sannfordur um, at við egnari megi eru vit menniskju, tá um frelsuna ræður, øll sum kamelur, ið skal gjøgnum eitt nálareyga, men hann var eisini sannfordur um, at tann, sum trýr á Jesus Kristus og heldur út til endan, skal verða frelstur av Guðs stóru náði. Hesum hvíldi hann í líka til sína síðstu stund.

Kurt er nú farin, og maður kemur í mans stað, men saknurin er stórur, bæði á ein og annan hátt hjá okkum øllum, ið høvdu við Kurt at gera sum starvsfelaga og vin. Góða Annefia, børnini, verbørnini abbabørn og systkin. Stórstur er saknurin hjá tykkum, sum hava mist mann, pápa, verpápa, abba og bróður.

Tað sigst, at tíðin lekir øll sár. Tað er nokk satt, men tann tíðin kann sýnast sera long. Harrin styrki tykkum í sorg og sakni.

So legg tú allan trega
í Harrans sterku hond,
lat trúgv og vón teg gleða,
um tíðin sýnist vánd.

Tað er ei tú, ið veldur,
ei tú, ið tekur ráð,
Guð veldisstavi heldur,
og ferð øll hans er náð.

Friður veri við minninum um Denhard Kurt Joensen.

Ellintur

Gullbrúdleyp

Í dag, 31. desember, hava hjúnini Hanna og Sigurd á Brúgv Johannesen, Vestmanna, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum. Tey, ið vilja heilsa upp á gullbrúðarparið, eru hjartaliga vælkomin frá kl. 17.00.

Gullbrúdleyp

Í dag, 31. desember, hava hjúnini Hanna og Karl Isaksen í Klaksvík verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Traðargøtu 13 frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.